almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# MÁLSVIÐGERI
## til Almannastovuna

**Á økisdeildini í Havn er eitt starv leyst at søkja.**

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og í serligum førum vísa áheitanum til serdeildir á stovninum.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá málsviðgerunum eru hesar**
- Vegleiða borgarum um rættindi og skyldur
- Útrokna og avísa veitingar
- Skriva játtanarskriv
- Journalisering
- Taka ímóti viðskiftafólki og taka telefonina
- Taka avgerðir í ávísum málum
- Loysa aðrar fyrifallandi uppgávur.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving, merkonom, HH ella onnur viðkomandi útbúgving og royndir
- Góður kunnleiki til KT
- Góður málsligur førleiki

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Starvið er flokkað í triðja lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, tel 35 35 70.

**Umsóknir**
Sendið umsókn við avriti av prógvum o.ø. til:
Almannastovuna, Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.

**Freist at søkja**
Umsóknarfreist er fríggjadagin 29. februar 2008 kl. 12.00.

KREA

STARVSLÝSING

# Avloysari fyri kunningarfólk

Fyri kunningarráðgeva okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja 1. mai og eitt ár fram.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við stjóran og leiðsluna og umvegis ymiskar miðlar, at skapa opinleika og vitan um dagliga virksemi hjá Landsverki, soleiðis at fólk fáa møguleikan at fylgja við og samstundis fáa eina greiða mynd av Landsverki.

Kunningarráðgevin arbeiðir somuleiðis fyri einum „konstruktivum" samstarvi við fjølmiðlarnar og syrgir fyri, at Landsverk altíð er til reiðar at veita fjølmiðlunum teir upplýsingar og tað tilfar, teimum tørvar.

At enda er kunningarráðgevin ein tænastuveitari til allar deildir hjá Landsverki, t.d. tá ið kunnandi tilfar skal framleiðast í sambandi við framløgur, ráðstevnur, lýsingarátøk o.a. Kunningarráðgevin tryggjar, at alt kunnandi tilfar frá Landsverki er umboðandi fyri stovnin – bæði í formi og innihaldi.

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Kunningarráðgevin vísir beinleiðis til stjóran.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kt-kunnleiki er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda Landsverki, Postsmoga 78, 110 Tórshavn ella til lv@lv.fo og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. februar 2008. Merkið umsóknina „Kunningarfólk" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð lýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella umvegis teldupostin ob@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*




# SKRIVSTOVUFÓLK
## TIL AVGREIÐSLUNA

Søkt verður eftir skrivstovufólki til avgreiðsluna at byrja skjótast gjørligt. Talan er um parttíðarstarv seinnapart á degi hvønn dag.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonmóttøku
- Skráseting av akførum
- Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
- Kassauppgerð
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi **áðrenn 29. februar 2008.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

SENDISTOVAN

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo



# Handilslærlingar

Søkt verður eftir **2 handilslærlingum** við sergrein innan sølu til sølubúðina í Havn. Sergreinin innan sølu er við serligum denti á vín og spiritus.

Læran umfatar allar tættir í rakstri av einum nútímans handli við denti á sølu, vørukunnleika og kundatænastu.

**Lærutíðin**
Hevur umsøkjarin HH-útbúgving er lærutíðin 2 ár. Um umsøkjarin hevur FHS-útbúgving er lærutíðin 3 ár. Fyri umsøkjarar við aðrari miðnámsútbúgving (student, HF, HT- ella HIF-prógv) er lærutíðin 2½ ár. Lærutíðin fyri umsøkjarar við aðrari miðnámsútbúgving og FHS er lærutíðin 2 ár. Kravdu handilsfakini skulu takast fyrsta árið á kvøldskúla (um neyðugt á dagskúla). Kravd útbúgvingarskeið verða væntandi tikin í Danmark.

**Lærlingurin**
skal hava hug til at nema sær kunnleika og førleika innan økið, sum Rúsdrekkasølan virkar á. Lærlingurin skal verða eldhugaður, initiativríkur og hava ynski um at verða við til at menna virksemið, sum Rúsdrekkasølan Landsins hevur. Lærlingurin skal verða fyrikomandi, álítandi og hava góð samstarvsevni. Eisini skal lærlingurin duga væl at samskifta við onnur og ynski um at veita góða tænastu á einum høgum tænastustøði.

Tey ið søkja, skulu hava FHS-, HH-, HF-, student-, HIF- ella HTX-útbúgving.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elsu Mariu Holm Olsen á telefon 31 42 77 ella teldupost emo@rusan.fo.

**Umsóknarfreistin**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal verða Rúsdrekkasølu Landsins í hendi í seinasta lagi 3. mars 2008.

SENDISTOVAN

**Rúsdrekkasøla Landsins**
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*